# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Humanitera ábyrgdin

Í áravís hevur altjóða samfelagið sitið hendur í favn, meðan fólkamorð verður framt í sudanska landslutinum Darfour. Sudan er eitt fjøltjóðað samfelag, har meginparturin av fólkinum er av arabsikum uppruna við muslimskari trúgv. Men vestantil í landslutinum Darfour býr tjóð av afrikanskum uppruna og hava hesi kristna trúgv, sum tey hava havt í øldir.

Muslimska stjórnin í Karthoum hevur í áratíggju forfylgt kristna fólkinum í Darfour, sum av góðum grundum gjørdi uppreistur fyri nøkrum árum síðan. Eftir drúgvt borgarastríð, var at enda fingin friður í lag. Men hesin friður er viðbrekin, og framvegis er hungursneyð í landslutinum. Tað vardi leingi, áðrenn ST og stórveldini tóku sær um reiggj til tess at hjálpa neyðstædda fólkinum í Darfour. Sum altíð tá talan er um Afrika, eru stórveldini sein at reagera, men at enda kom gongd á hjálpararbeiðið. ST hevur saman við altjóða hjálparfelagskapum roynt at fáa mat og heilivág til illa sperda landslutin.

Dagurin í dag er av ST lýstur altjóða Darfourdagur at vera. Hetta er gjørt til tess at vekja áhuga heimsins fyri neyðini í hesum hart plágaða landsluti. Tiltøk av ymsum sløgum eru um allan heim í dag. Hesi tiltøk venda sær mest til almenningin og til hjálparfelagskapirnar. Støðan í Darfour er trupul av ymsum orsøkum. Ein orsøkin er, at stórveldini hava lagt seg út í viðurskiftini í Sudan. Kina er í so máta á odda og stuðlar harðrendu muslimsku einaræðistjórnini í Karthoum av fullum huga. Hetta merkir so aftur, at Kina ikki stuðlar hjálparbeiðinum, men heldur er tað tvørturímóti so, at stórveldið leggur út fótonglar fyri hesum arbeiði. Kina tekur sum kunnugt ikki mannarættindin so tungt og tí batar lítið at koma við humanitert grundaðum áheitanum á hetta land. Sum nevnt er dagur altjóða Darfourdagur, og okkara myndugleikar áttu at nýtt høvið at gjørt vart við, at eisini Føroyar taka altjóða humanitera ábyrgd.

**Sosialurin**

# Fólksins ogn - spurningur til Tobba

**ANFINN OLSEN OG CHRISTIAN OLUF CHRISTIANSEN**
Umborð á Norland.
2007.04.30

Var inni á Portalinum 27. apr. 2007, hvar ið Torbjørn Jacobsen skrivar grein við yvirskriftini Fiskiloyvi rulla inn í ævinleikan, hvar í hann leggur eftir Bjørn Kalsø um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Tobbi vísur á paragraf 2 í lógini um vinniligan fiskiskap, hvar tað er staðfest, at fiskurin sum svimur rundan um Føroyar er ogn Føroya fólks.

Víðari verður sagt í lógartekstinum, at fiskirættindi latin sambært lógini, veita ikki bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu hesi rættindi takast aftur uttan endurgjaldsskyldu.

Nevndu ásetingar er greið staðfesting av, at alt livandi í sjónum, og øll fiskirættindi, sum tær almennu Føroyar varða av, eru almenn ogn – ogn fólksins – og latin fiskirættindi sambart galdandi lóggávu ikki geva einstaklingum ella feløgum nakran ognarrætt yvirhøvur.

Ein má tí undrast yvir, at reiðarar hava fingið loyvi til at selja fiskiloyvi, uttan at nakar hevur talað at og gjørt nakað við tað.

Er tað so sum Tobbi her vísur á í paragraf 2 í lógini um vinniligan fiskiskap, hví hava reiðarar fingið loyvi til at selja síni fiskirættindi og vunnið nógvar milliónir upp á at selja fólksins ogn, sum um tað er teirra egna ogn, tá ið tað stendur í lógini, at teir einki eiga í tí??? her er nakað, ið ikki ruggar rætt.

So nú til spurningin sum vit vóna, at tú er førur fyri at svara.

Hví gera tú og tínir líkar einki við hetta mál??? Hví fara tit ikki eftir hesum fáu og draga teir til svars fyri tað teir gera, og innheinta pengarnar, ið teir vinna við at selja tað sum tú kallar fólksins ogn, tá ið tað stendur so sera greitt í lógini, at fiskiloyvi ikki er teirra ogn. Hví er alt bara tos og tos og aftur tos, og eingin ger nakað.

Tá ið eingin ger nakað við tað, er tað harvið samtykt, at soleiðis skal tað verða. Um so er, takið so og strikið tað sum stendur **fólksins ogn** úr lógini.

Fiskurin sum svimur rundan um Føroyar, hevur ongantíð verið fólksins ogn; men reiðarins privata ogn, tað eru nógv dømi um tað.

Er tað ikki so, at tit politikkarar siga eitt; men meina nakað annað???

Ellars kann viðmerkjast, at úrslitið hjá Bjørn Kalsø ikki er øðrvísi enn tað altíð hevur verið. Teir somu hava altíð havt rættindini til fólksins ogn, ella „Hvat er fólksins ogn ?"

Vónandi svarar tú okkum uppá hendan spurning.

Gott nokk vita vit, at tú situr í andstøðu; men tit hava jú verið í samgongu?

# Uttanumtos, Jógvan við Keldu!

**HEÐIN MORTENSEN**
Borgarstjóri



Í vikuni er norðoyatingmaðurin Jógvan við Keldu komin við einum aftursvari til ta "hjálpandi hond", eg royndi at rætta honum herfyri, tá hann royndi at leggja alla ta donsku ríkisveitingina í høvuðsstaðnum. Men framvegis hevur hann ikki svarað!

Tað er altíð lætt at tveita ein pástand út, uttan at grundgeva fyri honum. Hetta var júst tað, sum Jógvan við Keldu gjørdi, og framvegis er hann ikki komin við nøkrum, sum líkist einari grundgeving.

Tvørturímóti kemur hann við einum donskum orðatakið um, at "den, der fortier, lyver også", fyri líkasum at siga upp á ein penari máta, at eg lúgvi. Ikki so lítið næsadjarvt, má sigast!

Í øllum førum síggi eg meg ikki føran fyri at grugga kjarnuna í øllum hesum so væl, sum Jógvan við Keldu megnar tað. Tí hann kemur við einari rúgvu av tølum, men framvegis uttan nakra grundgeving.

**Kom til sakina!**

Mín spurningur var, um Jógvan við Keldu kundi gera so væl at greiða Føroya fólki neyvt frá, hvussu hann fær tað til, at danska ríkisveitingin mestsum bara søtar tilveruna hjá havnarfólki!

Men hóast maðurin hevur havt ein heilan mánað at finna út av hesum, velur hann hegnisliga at smoyggja sær aðrar vegir, uttan at svara spurninginum.

Framvegis hevur Jógvan við Keldu ikki fortalt okkum, hvar í Føroyum allur blokkstuðulin sæst aftur. Kanska er tað roknistykki ikki so stuttligt at borðreiða fyri fólki, at best er at tiga?

Góði Jógvan við Keldu, gevst nú við uttanumtosinum og kom til sakina! Tá tú hevur sagt A, mást tú eisini siga B, og ikki alt møguligt annað, bara fyri at sleppa undan at svara!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.